FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

**Valreglur fyri akademiska ráðið**

Samsvarandi § 18 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við ll. nr. 51 frá 8. mai 2012, verður boðað frá, at mannagongdin fyri vali av akademiskum ráði verður henda:

1. Akademiska ráðið hevur 9 limir. Trý umboð fyri vísindastarvsfólkini verða vald á hvørjari megindeild. Eitt umboð fyri lesandi verður valt fyri hvørja megindeild. Rektarin er fastur limir og formaður í ráðnum. Umboð fyri vísindastarvsfólk verða vald fyri 3 ár í senn og lesandi fyri 1 ár.
2. Øll vísindafólk, her íroknað ph.d. lesandi, sum eru í starvi tann fyrsta í mánaðinum, sum valið fer fram, og sum eru sett minst hálva tíð,eru valbær.
3. Øll fulltíðarlesandi, sum eru innskrivað á Setrinum tann fyrsta í mánaðinum, sum valið fer fram, eru valbær.
4. Rektarin ásetir valdagin
5. Setursskrivstovan skipar fyri valinum til Akademiska ráðið sambært valreglum Setursins.
6. Uppgávur Akademiska ráðsins er m.a.:
    a. At ummæla fíggjarligar raðfestingar
    b. At ummæla týðandi strategisk granskingar- og útbúgvingarmál
    c. At ummæla mannagongdir fyri setan av fakligum metingarnevndum
    d. At gera niðurstøður um tillutan av ph.d.og ph.d.h.c. heitunum
    e. At taka vísindaetiskar spurningar upp eftir áheitan ella av egnum ávum
    f. Aðrar uppgávur, ið verða lagdar til ráðið sambært reglum Setursins
7. Ráðið kann umrøða allar akademiskar spurningar av týdningi fyri virksemi Setursins.
8. Ráðið velur á fyrsta fundinum skrivara og leggur fýra fastar fundir fyri komandi árið

26. februar 2014

Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya